# Dygdin á fiskinum avger úrslitið



- Rávøran hevur avgerandi týdning fyri, hvat fáast kann burtur úr fiskinum - og fyri písin, sigur dagligur leiðari á fiskavirki í Kjøllefjord í Noregi

**Seinastu mánaðirnar hevur fiskavirkið í Kjøllefjord í Noregi lagt dent á at gjalda prís eftir dygdini á fiskinum.**

**- Tað skal loysa seg hjá fiskimonnum at handfara fiskin væl. Á henda hátt vóna vit at kunna økja um dygdina á fiskinum, sigur dagligi leiðarin**

DYGD OG PÍSUR
*Vilmund Jacobsen*

Dygdin á fiskinum er heilt avgerandi fyri, um vit skulu vinna meira pening í fiskiídnaðinum.

Hetta sigur dagligi leiðarin á einum fiskavirki í Kjøllefjord í Noregi, Arild Olsen.

- Fiskimenn mugu gerast meira bevístir um, hvussu teir handfara rávøruna.

### Misjøvn dygd

Arild Olsen sigur, at skal meira peningur vinnast í fiskiídnaðinum, er neyðugt at leggja alla orku í dygdina á fiskinum

- Rætti hugburðurin má byrja longu, tá ið fiskurin kemur inn á dekkið.

Hann sigur, at fleiri av skipunum, sum landa til virkið í Kjøllefjord, koma við fyrstafloks fiski, meðan verri er statt við fiskinum hjá øðrum skipum.

- Fiskurin kann vera veiddur í sama øki, og veiðitíðin kann vera júst hin sama. Kortini síggja vit, at handfaringin er ógvuliga misjøvn - alt eftir, hvørji skipini eru. Tað er tí eingin ivi um, at við betri viðfaring av fiskinum umborð, fáa vit eina heilt aðra rávøru, sum kann nýtast betri í framleiðsluni og somuleiðis geva ein betri prís, sigur Arild Olsen.

### Bara dygdin

Rávøran hevur avgerandi týdning, bæði fyri tað, sum fáast kann burtur úr fiskinum og písin - ikki minst, har marginalarnir eru smáir.

- Eg síggi onga meining í at kjakast um, hvørt minstiprísurin er rættur ella ikki, soleingi rávøran er so misjøvn. Tað, sum vit mugu røða um framyvir, er rávøran. Tá ið hon er í lagi, verður minstiprísurin eisini betur.

Seinastu mánaðirnar hevur virkið, har Arild Olsen er dagligur leiðari, lagt dent á at gjalda prís eftir dygdini á fiskinum.

- Hetta fara vit framhaldandi at gera, tí tað skal loysa seg hjá fiskimonnum at handfara fiskin væl, sigur hann.

## Kvinnurnar tjena nógv minni í fiskiídnaðinum

LØNARMUNUR
*Vilmund Jacobsen*

Í Noregi kunnu tey ikki rósa sær av, at landið telist millum tey í Evropu, har best stendur til við líkaløn millum kvinnur og menn.

Samanlagt eru 11% á muni á inntøkuni til fyrimuns fyri menninar við somu starvsroyndum og útbúgvingum hjá báðum kynum.

Eisini innan somu starvsgreinir tjena kvinnurnar minni enn menninir.

Hetta vísir ein nýggj kanning í Noregi.

### Fiskiídnaðurin

Eitt av starvsøkjunum, sum er við í kanningini, er fiskiídnaðurin. Her tjena kvinnurnar heili 17% minni enn menninir!

Granskarin, Hege Torp, sum starvast við samfelagsgransking á lærustovni í Noregi, hevur lagt fram hesa kanning sum vísir, at Noreg als ikki telist millum tey lond í Evropu, sum eru best stillaði við líkaløn millum kynini.

## Blindur villaksur

Í Noregi hava granskarar funnið fram til, at nógv laksasmolt hjá villum laksi gerast blind.

Laksur, sum er raktur av súrevni úr luftini og aluminiumsdálking, kann fáa álvarsligar eygnaskaðar.

Sagt verður, at blindur laksur eitt nú er meira útsettur fyri at fáa lús.

Granskarar meta, at eygnaskaðarnir kunnu vera atvoldin til, at so fáir laksar eru at síggja í áunum í Noregi.

*-v.*

## USA bannar línuveiði

Fiskivinnumyndugleikarnir á vesturstrond Ameriku hava sett forboð fyri línuveiði eftir eitt nú tunfiski, svørðfiski og hávi. Frammanundan er slíkt veiðiforboð galdandi fyri havið útfyri Kaliforniu.

Nú hevur Pacific Fishery Management Council eisini sett forboð fyri veiði útfyri statunum, Oregon og Washington.

Forboðið er galdandi innanfyri 200 fjórðinga fiskimarkið hjá nevndu statum í USA.

*-v.*

# Ein gloymdur partur av føroyskum útflutningi

**- Er marknaðarførsla ein gloymdur partur í føroyskum útflutningi, tá ið hugsað verður um annað enn fiskaútflutning? spyr Menningarstovan**

INNSENT TILFAR
*Redigerað: Vilmund Jacobsen*

Ein framúr góð vøra, tann rætti prísurin og ein effektiv distributión, men vantandi søla. Ein vanlig støða hjá einari fyritøku, ið ikki ger seg sjónliga. Verður ikki marknaðarført á rættan hátt, verður sølan hareftir.

Ein væl fyrireikað útflutningsstrategi, annaðhvørt útflutt verður til útlendsk skip, ið leggja leiðina fram við Føroyum, til fyritøkur í øðrum londum ella til oljuídnaðin, gevur einari fyritøku betri fortreytir at vaksa um sítt virksemi og verða ríkari, bæði fíggjarliga, vitanarliga og arbeiðsliga.

Fyri at minka um kostnaðin og váðan, tá útflutt verður og fyri at tryggja sær at vinna í kappingini við kappingarneytar, bæði á heimamarknaðinum og á útimarknaðinum, er tað ein fortreyt, at fyritøkan er væl fyrireikað og hevur eina strategi, ið verður fylgd.

Menningarstovan spurdi herfyri 30 føroyskar fyritøkur innan ymsar vinnugreinar, eitt nú skipasmíð, elektro-/mekaniskan ídnað, framleiðslu av reiðskapi og tænastum til fiskivinnu og alivinnu og KT-fyritøkur um, hvørjar tørvir og førleikar tær hava ella vanta, tá hugsað verður um marknaðarførslu og útflutning. Nøkur av svarunum síggjast her.

Menningarstovan
www.trade.fo











Kaj Gaard Faerco
Elektromekaniskur verkstaður & el-innleggjaravirki
24 tímar
Tað finst altíð ein loysn!

Endurvinding:
- generatorar
- el-motorar
- og aðrar roterandi lutir

Søla/goymsla:
- Elektrim el-motorar
- Transmotor dynamoir/generatorar

Tænastur:
- umvælingar av generatorum
- turka yvirgang burtur
- skifta legur
- alt vanligt el-arbeiði inni sum úti
- bílegging av nýggjum lutum

V/Sjúrður P. Joensen
J. C. Svabos gøta 60
Postboks 332
110 Tórshavn
Tlf. 32 19 11
Fax 32 19 41
Fartelef. 22 72 88
E-mail: kgf@post.olivant.fo
Heimasíða: http://www.faerco.com



OXYMAT®
MADE IN GERMANY
- OXYGENGENERATORAR
- NITROGENGENERATORAR



Lat okkum hyggja uppá tað!
Spf MAINHARD HALDANSEN
tlf. 315339 - 215369 • fax 321369
e-post: mainhard@post.olivant.fo



COMPAQ
Vit hava tey røttu amboðini at stýra fyritøkuni...
Vektir/grader
Liðugtvøruskipan v/veiðudagbók
Avreiðing og Avrokning
Viðlíkahaldsskipan
Plattaskipan
Klokkuskipan
www.com-data.fo
COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840

KA quality kassar & súgvur til alivinnuna



Framleitt í samráð við føroyskar alarar!
- Skjót, einkul og effektiv upprudding av deyðum fiski
- Skjót, einkul og effektiv upprudding av fóðurrestum
- Minkar um vandan fyri bakterium og smittuvandum
- Økir um trivnaðin hjá fiski - Fiskurin veksur betur

Umframt bjóða vit:
kki t er
ey t er
ar in ar t er
an skar ti en a
an r ti en a
Luksus Termodraktir TILBOÐ 598,-
Sosialurin - 311820
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • Smásøla • Umboð
Tel. 315600 - info@andreasen.fo